## Claus rýmdur úr Fleetwood

Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen leitar nú eftir nýggjum felag at spæla fyri í Onglandi. Claus spældi í eina tíð fyri Fleetwood, men har er hann givin, tí hann flutti bústað, og so gjørdist tað ov langt at ferðast til venjing í felagnum. Nú vónar Claus, at hann kann finna eitt nýtt felag spæla fyri, og hann vónar, at hann kann sleppa at spæla í næstbestu ella triðbestu deildini í Onglandi.



## AaB stongir dyrnar

Venjarin hjá danska felagnum AaB syrgdi í gjár fyri, at AaB vandi fyri stongdum dyr. Í farnu viku tapti AaB steypadyst ímóti 2. Deildarliðnum Hobro, og venjarin Magnus Pehrsson vildi í gjár hava sínar menn fyri seg sjálvar til venjing. AaB skal í kvøld spæla ímóti OB í superliguni, og venjarin vil hava spælararnar at vísa ein heilt annan hugburð enn í steypadystinum í Hobro.

## VÍF-KÍF 27-29 (15-17)

# Nú er kollfirðingar við

**Tað var nær við farna vikuskiftið, og hesaferð eydnaðist tað. Á borgini í Vestmanna fingu kollfirðingar óvæntað síni fyrstu stig í hesum kappingarárinum**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Tá Andrias Nielsen í seinasta minuttum brádliga ikki var nóg væl ansaður og kundi økja um leiðsluna, kendi tú léttan á kollfirðingunum. Fyrstu stigini í hesum kappingarárinum vóru veruleiki.

Hóast úrslitið kom óvæntað á, hevur tað ligið í luftini seinastu vikuna, at stigini komu skjótt. Fyri viku síðan tapti KÍF við bara tveimum málum á útivølli móti Kyndli, og í gjár eydnaðist at vinna við tveimum málum á útivølli móti VÍF.



Gert Hansen er komin fyri seg aftur eftir drúgvan skaða, og hann taldist millum drúgvaru málskjúttarnar hjá KÍF í Vestmanna í gjár

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Úrslitið hevur alstóran týdning fyri venjaran Jan Ottosen. Hann tók við venjarastarvinum í summar, og hevur nú vunnið felagnum fyrstu stigini undir hansara leiðslu.

KÍF hevur seinastu trý árini myndað botnin í bestu mansdeildini. Kári Mortensen var venjari, tá bulurin á liðnum skuldi skiftast út. Tað hevur framvegis ikki eydnast við góðum úrslitum á vøllinum. Nú roynir Jan Ottosen, og tílíkir óvæntaðir sigrar, sum tann í Vestmanna í gjár, hava stóran týdning, um tað framvegis skal verða hugaligt hjá yngru leikarunum at venja og menna seg.

KÍF hevði uppiborið sigurin í gjár. Teir vóru omaná við tveimum málum so at siga allatíðina, og vestmenningar runnu bara aftaná. Miðskeiðis í seinna hálvleiki vann VÍF sær leiðsluna, men stríðhugaðu kollfirðingarnir bardu seg aftur í dystin, sum við 14 útvísingum var heldur hart leiktur.

## Neistin-H71 33-24 (14-10)

# H71 bumbað niður

**Uttan eina verju, ið var á tærnum, fekk H71 ikki gjørt nakað sum helst við skotsterka Neista-liðið**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Hóast meistaranir úr Hoyvík hava sagt farvæl við fleiri av stóru profilunum frá liðnum í fjør, so hava teir væl og virðiliga hingið í oddinum. Fyrst og fremst takkað verið eini góðari verju, umframt at spælararnir hava verið nóg kaldir til at taka av, tá møguleikarnir hava verið í álopsspælinum.

Hvørki av hesum riggaði tó serliga væl sunnudagin. Frá byrjan hevði Neistin hug at toga seg frá mótstøðuni. Hóast spælið ikki var so flótandi, so sluppu skjúttarnir ofta væl fram at skotum, tí hoyvíkarverjan mestsum einvíst hugsaði um Jugoslav Djumic á strikuni. Og í álopsspælinum rendu hoyvíkingarnir seg ofta í Ára Dam, sum stóð ein fínan dyst í Neista-málinum.

Og so slapp Neistin veruliga at folda seg út. Fleiri ferðir er funnist at, at spælið á liðnum ikki koyrir nóg væl. Og tað er kanska rætt. Men við teimum profilum, sum liðið telur, so kunnu mál koma frá øllum kantum og vinklum, og tað var tað, sum hendi hesaferð.

David Edvardsen, sum var hálvskaddur, bankaði 10 mál inn av høgra veingi, og í hinum borðinum hevði Sjúrður Thomassen ein frálíkan dyst, har sjálvsálitið bara tóktist at økjast fyri hvønn minutt, sum gekk av dystinum.

Seinna hálvleik skrædnaði av álvara, tá hoyvíkingar eina løtu høvdu hug at forcera í spælinum, soleiðis at mistøkini gjørdust fleiri, og so trumlaði Neistin avstað.

Enn er fyrsti fjórðingurin av kappingini bara farin gott og væl aftur um bak, men tað er longu nú nógv, sum bendir á, at Neistin verður drúgvari í ár, enn teir vóru tað í fjør. Framvegis er profilar á liðnum, sum ikki veruliga hava verið í spæl, og hópurin er tí breiðari enn hann er hjá nøkrum av mótstøðuliðunum.

Hoyvíkingar prógvaðu tað ikki hesaferð. Men teir hava kvalitetir, sum kunnu senda teir heilt fram, og megna teir at beina skútuna aftur á beint, áðrenn teir næstu ferð møta strandingum, leggja teir seg alt fyri eitt út aftur í stríðið um finalupláss.

## StÍF-Kyndil 29-24 (15-14)

# Útlendingarnir tóku ábyrgd

**Cristian Preda og Gabriel Stanciu gingu aftur undan hjá StÍF um vikuskiftið, sum vann trygt við fimm málum á Kyndli í gjár. Tískil eru tað í løtuni strandingar, sum eru nærmastir oddaliðnum**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Tað broytist hvørja viku. Og nú er tað StÍF, sum er besta boðið at elta oddaliðið.

Strandingar vunnu í gjár trygt við fimm málum á Kyndli. Teir vóru omaná allatíðina í seinna hálvleiki, og hóast gestirnir úr Havn royndu at svara aftur í seinna hálvleiki, eydnaðist tað ongantíð at hótta leiðsluna hjá StíF.

Cristian Preda og Gabriel Stanciu hava roynst strandingum serstakliga væl í hesum kappingarárinum. Soleiðis var aftur í gjár, hóast teir vóru væl ansaðir í stórum løtum av dystinum.

Serliga beint eftir hvíldina, tá StÍF vann sær trygga leiðslu, gingu teir undan.

StÍF vann seg í gjár upp á átta stig, sum eru tvey færri enn oddaliðið, Neistin. Kyndil dragnaði og er nú á fjóðra plássinum – fýra stig eftir grannarnar úr Neistanum.